# Lærarastarv í Tofta skúla

Eitt fast fulltíðarstarv við Tofta skúla er leyst at søkja. Starvið verður sett frá **1. august 2006.** Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Tann, ið verður settur í starv, skal kunna átaka sær:**
- flokslærarauppgávu
- undirvísing í máli
- undirvísing í handaligum lærugreinum

**Vit seta í løtuni fokus á:**
- virðisgrundarlagið fyri Tofta skúla
- um- og útbygging, væntandi liðugt 2008
- undirvísingarpartarnir sum sjálvstýrandi toymi

**Vit vænta at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og er hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan.

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum **í hendi í seinasta lagi týsdagin 16. mai kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 og 747765 ella Olaf Magnussen, varaskúlastjóra á tlf. 447332 og 270963.

**Tofta skúli**
Postboks 41
FO-650 Toftir

*Tofta skúli hevur komandi skúlaár um 189 næmingar og um 20 lærarar.*
*Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof*

# Hús til sølu í Oyndarfirði



Um hóskandi boð fæst, er ein ogn í Oyndarfirði matr. nr. 92, til sølu.

Grundøkið er 280 $m^2$ og ástandandi húsini eru í trimum hæddum, hvarav kjallarin ikki er innrættaður.

Miðhæddin, ið tilsamans er 34 $m^2$, fevnir um stovu, køk, wc og lítla gongd við trappu upp á loft.

Á loftinum, ið er 23 $m^2$ til støddar, eru 2 kømur umframt ein lítil gongd.

Húsini, ið eru væl egnað til summarhús, hava tørv á ávísum ábøtum.

Áhugað kunnu venda sær til Advokatskrivstovuna, att.: Jens Andrias Vinther, adv. ft., e-mail jav@jura.fo ella Birnu Joensen, skrivara, e-mail bij@jura.fo

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9**

**Halgir Winther Poulsen, adv.**
**Fríða Patursson, adv.**
**Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.**
**Christian Andreasen, adv.**
**Niels Winther Pouslen, adv.**
**Jógvan E. Winther Poulsen, adv.**

**Tlf. 311145 · Telefax 31 15 25**
**e-mail: jura@jura.fo**

# Navnakapping

Í samband við at barnagarður verður bygdur í Sørvági, verður útskrivað navnakapping til barnagarðin.

Uppskotini skulu skrivast á ein lepa og leggjast í ein brævbjálva við frámerki á. Gott hevði verið, um ein frágreiðing um, hví júst hetta navnið er hóskandi til barnagarðin, fylgir við.

Avsendari skal ikki skrivast á brævbjálvan.

Í ein annan brævbjálva, við sama frámerki, skal navnið á tí, ið eigur uppskotið skrivast.

Merki brævbjálvan "NAVNAKAPPING".

Uppskotini skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1.juli 2006.

Kommunustýrið skilar sær rætt til ikki at brúka nakað uppskot.

Velur kommunustýrið eitt uppskot, fær vinnarin 5.000,oo kr. í virðisløn.

Eru tað fleiri. ið hava sama uppskot, verður lutakast millum tey, sum hava vinnarauppskotið.

Navnið verður avdúkað, tá barnagarðurin letur upp.

Sørvágs Kommuna
Att.: Gitta av Kák
Varðagøta 8
380 Sørvágur

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo